

## Raðhús í Berjabrekku 121, íbúð nr. 91

Eigaraíbúð á Berjabrekku við bergtakandi útsýni yvir býin og Nólsoyarfjørð til sølu.
Íbúðin er í tveimum hæddum, og gólvvíddin er 106,6 m² tilsamans.
1. hædd: durur, baðirúm við brúsu, gongd við trappu, stova og køkur í einum.
2. hædd: gongd, 1. hjúnarrúm, 2. kømur og baðirúm við brúsu.
Íbúðin er sum nýggj. Klædningur, hurðar og termo plast vindeygu eru skift fyri stuttum.
Barnavinarligt umhvørvi.
Gott bussamband.
Friðaligt og tætt til handils.
Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Advokatvirkið, tlf. 312171.

Ognin verður seld, um nóg høgt boð fæst.

**Advokatvirkið**

Páll Nielsen, adv. Eyðhild Skaalum, adv.
Sigmund Poulsen, adv. Hans Trygvi Teirin, adv.

Skansavegur 1 • Postsmoga 85 • FO-110 Tórshavn
Tlf. 312171 • Fax 315874 • jus@advokatvirkid.fo
www.advokatvirkid.fo

## ELDRI HÚS Í HVALVÍK TIL SØLU



*Húsini* standa í friðarligum og barnavinarligum umhvørvið. Uttanum er stórur urtagarður við nógvum trøðum og runnum. *Grundøkið* er 1054 m² til støddar.

Húsini, ið eru bygd fyrst í 50'unum, og útbygd í 1973-74, eru í trimum hæddum, íalt uml. 170 m² + kjallara. *Á miðhæddini* eru: Durur, gongd við trappu upp á loft. Køkur + stova, baðirúm v/brúsu, 2 kømur, hjúnarrúm og vaskirúm. *Á loftinum* eru: Gongd+sjónvarpsstova, 2 kømur og baðirúm v/ baðikar. *Í kjallaranum* er oljufýr og oljutangi annars óinnrættað.

*Vindeygu og klæðningur* á eldra partinum er frá 2005.
Harumframt er bilhús og undir altanini er úthús.

Húsini verða seld um hóskandi boð fast.

Áhuga kunnu venda sær til Magnus Magnussen á tlf. 423490 ella 508586

## Miðnámsskúlanum í Suðuroy

Treytað av góðkendum undirvísingarvirksemi verða frá **1. august 2008** leyst at søkja

### Eitt starv sum kemilærari.

**Fólk, sum um at vera liðug at lesa, eru eisini vælkomin at søkja.**

Umsøkjarar, ið ikki hava námsfrøðiliga útbúgving, og sum verða settir, skulu í august mánaði taka námsfrøðiligt innleiðsluskeið, sum Mentamálaráðið skipar fyri.

Skúlin fer í tilmæli sínum um setan í fast starv at leggja dent á, at umsøkjararnir hava kunnleika til føroyskt mál og føroysk viðurskifti, og um teir ikki hava tað, at teir eru sinnaðir at ogna sær innlit og vitan um hetta. Umsøkjarar, ið ikki hava kunnleika til føroysk mál og føroysk viðurskifti, kunnu søkja um setan sambært treytunum í 2-ára sáttmála. Hetta merkir, at umsøkjari verður settur í eitt 2 ára tíðaravmarkað starv, og at skúlin rindar flyti- og ferðaútreiðslur aftur og fram millum verandi bústað og Miðnámsskúlan í Suðuroy. Upphæddin til flyti- og ferðaútreiðslur er í mesta lagi 30.000 kr., og er hon skattskyldig. Um viðkomandi seinni ynskir at søkja fast starv við Miðnámsskúlan, verður sókt á jøvnum føti við aðrar umsøkjarar.

Miðnámsskúlin flytir í nýggj hølir til jóla. Roknað verður við, at lærararnir hjálpa til við innrættingini av hølunum.

Umsøkjarar kunnu fáa meiri at vita um endamál skúlans við at venda sær til leiðslu skúlans ella við at vitja heimasíðu skúlans: www.midnam.fo

Starvssetanin verður sambært sáttmála millum Yrkisfelag studentaskúla- og HF-lærara (YF) og Fíggjarmálastýrið. YF-umsóknarbløð fáast frá Yrkisfelagnum ella frá skúlanum (tlf. 373622, faks 374026, e-mail ole@midnam.fo)

Umsóknin skal sendast til Miðnámsskúlan í Suðuroy, att. Ole Laursen, deildarleiðari, 900 Vágur, í seinasta lagi **1. juni 2008.**

ASK.fo

## TOEFL-roynd

### leygardagin 16. august 2008
### (Test of English as a Foreign Language)

Møguleiki er aftur at taka sonevndu TOEFL iBT-royndina í Føroyum. TOEFL-royndin er ofta upptøkukrav á hægri lærustovnum í ensktmæltum londum.

Royndin verður **leygardagin 16. august 2008 kl. 12** á Fróðskaparsetri Føroya, Nóatúni 3.

Tilmeldingarfreistin er í seinasta lagi 8 dagar undan royndini.

**Tilmelding on-line fer fram á:** www.ets.org/toefl

**Kostnaðurin er 155 USD.**

**Altjóða Skrivstovan**
tlf. 322065
ask@ask.fo
www.ask.fo

**Fróðskaparsetur Føroya**
tlf. 352500
setur@setur.fo
www.setur.fo

**www.bkv.fo**



**10 mannafar**

Hann er bygdur í Miðvági 1988. Hann hevur snellur, radara, ekkolodd, VHF og leysa NMT telefon.
Maskinan er 30 HG Sole.
Báturin er í góðum standi og annars væl røktur



**28 fót opin bátur**

Báturin er bygdur 1981 á Sandi. Snellur, línuspæl, sjálvstýrara, ekkolodd, GPS v.m.

Meiri á heimasíðu okkara, www.bkv.fo

**BKV**
**Jákup Dahlsgøta 2 · Tórshavn**
**Tlf. 310 090 • Fax 312 091**
**e-mail: bkv@bkv.fo**
*Kring Føroyar...*

## Áheitan

**Kanningin:**
**Føroyskar kvinnur og lívsgóðska**
**- hevur tú trupulleikar at halda uppá vatnið?**

Hevur tú ikki latið spurnarblaðið inn? Vit gera vart við, at móttøkan av spurnarbløðum endar 30. mai.

**Vinarliga Ása Róin, Hildur við Høgadalsá**

**Sjúkrarøktarfrøðisskúli Føroya**

# Loppumarknaður

við tombola og kaffiútsølu verður í Støkkhøllini á Glyvrum, leygardagin 31. mai frá kl. 10.00 til kl. 18.00.

Lutir kunnu latast inn í Støkkhøllina, týsdagin 27.05, mikudagin 28.05 og hósdagin 29.05, frá kl. 17.00 til 19.00.

Eisini ber til at gera eina avtalu á tlf. 219214 (Karin) og 226088 (Maria).

**Fornminnisfelagið á Glyvrum**